**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur

## til avloysarastarv fyri deildarleiðara

Á G3 er eitt avloysarastarv fyri deildarleiðararan leyst til setan frá 1. mai ella eftir avtalu til og við 31. desember 2006 vegna barnsburð.

Á G3 eru hesi medicinsku ambulatoriini, hæmodialysan, cardiologisk amb., onkologisk amb., diabetes amb., nuclear med./lunga amb. og klinisk neuro fys.lab. Vit sóknast eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi við drúgvum fakligum royndum innan medisinska viðgerð og røkt og við góðum samstarvsevnum.
Deildarleiðarin skal virka fyri, at deildin virkar sum ein eind, við best møguligari nýtslu av starvsfólkaorku og kanningarhølum til gagns fyri sjúklingin.
Deildarleiðarin hevur, innan tað sjúkrarøktarfakliga øki, tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á medisinska deplinum.

**Deildarleiðarin hevur ábyrgd av:**
- sjúkrarøktini
- klinisku arbeiðsuppgávunum
- tí dagligu leiðsluni á deildini
- fakligu menningini
- fíggjarstøðuni á deildini

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- fakliga kompetentar starsvfelagar

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- drúgvar fakligar royndir innan medisinska øki
- royndir í kliniskum arbeiði
- royndir og hug til leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólkum
- visiónir og er sjálvstøðug/ur og kreativ/ur í arbeiðinum

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- cardiologiska ella dialysu serútbúgving
- leiðsluútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmálanum millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Starvslýsing og fleiri upplýsingar** fáast við at venda sær til Evu Mortensen deildarleiðara á G3, lokal 6250 ella Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 24. mars 2006 kl. 12.00.

**Skivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv« við avritum av C.V., autorisation, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildina.
att. Una Dalsgaard
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

S A N G B Ó L K U R I N Vitin



# Eysturoyingar – komið og syngið við!

Leygarkvøldið 11. mars kl. 21.00,
skipar sangbólkurin Vitin, Klaksvík fyri sangløtu í

# Ítróttarhøllini í Runavík

Á skránni er: felagssangur – kvartettsangur – upplestur – leikur – tala
Aftaná verður bjóðað kaffi við onkrum afturvið

*Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum. Sálmur 34,9*

*Øll eru hjartaliga vælkomin*

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of *KPMG* International a Swiss Cooperation

Starvslýsing

# Fíggjarleiðari til P/F Hotel Hafnia

Fyri P/F Hotel Hafnia verður søkt eftir fíggjarleiðara.

Á hotellinum starvast 40 fólk.

**Starvið**
Starvið fevnir m.a. um:
- Alt vanligt bókhaldsarbeiði,
- umsiting av lønartengdum viðurskiftum hjá starvsfólkum,
- gerð av fíggjarætlanum,
- gerð av mánaðar- og ársroknskapum, umframt
- at samskifta við stjórnina í fíggjarspurningum.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur:
- Hollan kunnleika til bókhald,
- kunnleika til bókhaldsskipanina Concorde og Lundan,
- kunnleika til E-tollskipanina
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og
- evni at samstarva.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 1. apríl 2006

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 22 28 52.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f. spekt@spekt.fo www.spekt.fo

Staravegur 17, Postboks 3258, FO-110 Tórshavn, Telefon 34 34 34, Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15, Postboks 190, FO-600 Saltangará, Telefon 474 474, Telefax 474 475

Sosialurin Sosialurin i